# Lívið sá ljóst og vónríkt út

**Alt gekk, sum tað skuldi hjá Leivi Sørensen. Hann var nýgiftur og var júst fluttur í nýbygd hús saman við konuni og ársgamla soninum. Eftir skattalistanum at døma var hann størsti skattaborgari á Viðareiði tað árið. Men so hendi vanlukkan, sum nærum kostaði honum lívið. Øll 25 árini síðani tá, hevur hann verið pínu-stungin av skaðanum, hann fekk. Sum tíðin leið, gjørdist pínan so nívandi, at fyri honum var deyðin einasti útvegur**



*Í 25 ár hevur Leivur Sørensen liðið av øgiligari pínu, orsaka av einum koyrilsbresti, hann fekk í eini ferðluvanlukku. Eftir at hava roynt allar viðgerðir, ið hugsast kunnu, hevur hann nú fingið hjálp frá einum donskum lækna*

Mynd: Rúna Sivertsen

FÓLK Á LEIÐINI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

- Tað var tátt norðanfyri, men tá vit komu út um tunnilsmunnan oman fyri Ánirnar, var glerstoytt. Nakað niðri í brekkuni var eingin bilverja. Bilurin fór útav og bóltaði einar tríggjar ferðir runt.

Tá avtornaði, lá eg hálvur út gjøgnum hurðina, kleimdur undir bilunum og einum steini. Sjálvur minnist eg einki av hesum - vanlukkudagurin er fullkomiliga burtur úr minni mínum.

Soleiðis greiðir Leivur Sørensen av Viðareiði frá ferðsluvanlukkuni, sum fyri smáum 25 árum síðan nærum kostaði honum lívið.

## Lívið bjargað - heilsan mist

Øll árini síðan tá, hevur Leivur livað av heilvági fyri høvuðpínu. Hann hevur runnið frá einum lækna til annan. Tað finst neyvan tann viðgerð, hann ikki hevur roynt.

- Allur peningurin, sum vit skuldu havt nýtt uppá húsini, er farin til viðgerð av øllum møguligurm slagi, sigur hann.

Men einki hjálpti, og sama hvat hann royndi, fekk hann ikki verið til fyri pínu.

Ikki bert pínan var ræðulig, men eisini máttloysi um, at hann ikki fekk verið tað fyri familjuna, sum ein maður eigur at vera. Hetta nívdi hann so nógv, at hann meiri enn eina ferð royndi at taka lívið av sær.

Nógv ár skuldu ganga, áðrenn Leivur fekk at vita, hvat bagdi. Tað var í 1992, tá hann fór til fysioterapeutin, Leilu á Lofti, at hann fekk at vita, at hann hevið koyrilsbrest.

Vit venda aftur til vanlukkudagin.

## Buldrut jól

Bert 14 dagar frammanundan vóru Leivur og Anna vorðin maður og kona. Nú gleddu tey seg at halda fyrstu jólini í nýggju húsum sínum, saman við ársgamla soninum.

Tollaksmessudagur var, og Anna nýtti høvið at fara við Leivi til Klaksvíkar, tá hann fór at koyra ein vinmann til Ternuna. Um enn allar jólagávurnar vóru keyptar, so kann ein klaksvíkskona á Viðareiði altíð finna okkurt at fara til Klaksvíkar til dagin fyri jólaaftan.

Men hesin túrurin gjørdist ein lagnutúrur, og jólini hjá Onnu vórðu hildin við sjúkrasongina hjá deyðsjúka manninum.

## Hildu hann vera deyðan

Úr Ánunum høvdu fólk sæð bilin farið útav og lupu niðan at vita, hvussu til stóð. Anna og vinmaðurin fóru niðan á vegin, har tey fingu fatur á fólki.

Tað eydnaðist monnunum at lyfta bilin so mikið, at tey fingu Leiv leysan. Hann var nú bláur og lívleysur, og tey ivaðust ikki í, at hann var deyður.

Sjúkrabilurin kom, og Leivur varð fluttur á sjúkrahúsið, har hann vaknaði aftur hálvantriðja tíma seinni við ræðuligari pínu. Hann hevði fingið álvarsligan skaða, og somu nátt varð hann fluttur á Landssjúkrahúsið.

Á landssjúkrahúsinum varð staðfest, at nýrað var so nógv skatt, og 3. jóladag varð hann lagdur undir skurð, og annað nýrað mátti takast.

Alla tíðina var konan hjá honum. Jól og jólagávur var ikki í tonkum hennara, her hon sat hjá manninum. Hann lá og tosaði við ongum skili, orsaka av øllum morfininum hann fekk.

Leivur hevði eisini fingið álvarsligan heilaskjálvta, og tá hann einaferð kom fyri seg, sá út fyri honum, sum lá alt á liðini.

## Ein oyðimarkargongd

Leivur var ógvuliga stívur í nakkanum og niður í rygg-in, men eingi brot sóust, so einki varð gjørt við tað.

Hann varð útskrivaður 10. januar og fekk at vita, at hann kundi fara til skips aftur út á várið.

Hann gleddi seg eisini at sleppa aftur á sjógvin, tí sjólívið var hansara lív. Sum so nógvir aðrir var hann farin til skips bert 14 ára gamal, og seinni hevði hann tikið skiparaprógv.

Stutt fyri vanlukkuna hevði hann, saman við øðrum, keypt trolara, men enn hevði hann ikki verið nakran túr við Rivkolli, sum báturin kallaðist.

Men tað gekk als ikki hjá honum at arbeiða umborð. Hann lá fyri tað mesta í koyggjuni og var meiri til møði enn føði umborð.

Hann mátti í land, og nú byrjaði ein oyðimarkargongd frá einari kanning til aðra. At enda varð staðfest, at hann leið av posttraumatiskari høvuðpínu.

Fínt navn, men eingin hjálp.

## Krubban tømist

Á landssjúkrahúsinum hevði Leivur tosað við ein sosialráðgeva, sum segði, at hann kundi onga hjálp fáa frá tí almenna, fyrrenn hann hevði brúkt hvørt oyra.

- Vit vóru so illa fyri, at okkum kom als ikki í huga at royna heimatryggingina av sjómonnum, sigur hann.

Einaferð út á várið, ringdi svágur hansara til Fiskimannafelagið, og tá eydnaðist Leivi at fáa minstuløn í 3 mánaðar. Men heldur ikki har var nakar, ið minti hann á heimatryggingina.

Tríggjar mánaða minstalønin varð soleiðis einasta inntøkan hjá honum í eitt heilt ár.

Tað gekk long tíð, áðrenn Leivur fekk nakran fíggjarligan stuðul frá tí almenna. Tó sigur hann, at bæði lands- og kommunuskattur var honum eftirgivin.

Seinni eydnaðist honum at koma undir endurútbúgving, og Leivur fór á HF. Men heldur ikki skúlagongdina megnaði hann, orsaka av høvuðpínuni.

Eftir at hava roynt ymiskt annað, gjørdu Leivur og konan av at fara niður til Danmarkar á skúla. Tey fluttu niður til Haslev, har hann byrjaði at lesa á Haslev Teknikum.

## Vildi sleppa at doyggja

Alla tíðina hevði Leivur tikið sterkan heilivág móti pínu og hevði stútt ilt í høvdinum, niður í nakkan og í rygginum.

Alt hetta byrjaði at ganga honum uppá á nervarnar, og at enda varð hann lagur inn á psykiatriska deild.

Har hoyrdi hann fyrstu ferð orðið depressión nevnt. Hann hevði sagt fyri læknanum, at hann onkuntíð hevði hugsað um at tikið lívið av sær. Men hóast tað, útskrivaði læknin hann, gav hon heilivág fyri nervarnar og segði:

»Tekur tú hetta glasið í einum, so steindoyrt tú!«

- Eg haldi, læknin segði hetta fyri at ræða meg, so eg ikki gjørdi nakað býtt, sigur Leivur.

Men ein dagin sá alt so vónleyst út hjá honum - alt gekk illa, og skuldarkensla mótvegis konuni nívdi.

Nú hann sá bara deyðan sum útveg.

Hann skrivaði konuni eitt bræv, fór út um býin og hvølvdi allar tablettirnar í seg í einum.

Hvat síðani hendi, veit Leivur ikki. Hann vaknaði uppaftur á sjúkrahúsinum í Ringsted, har hann varð útpumpaður.

Hetta var ikki einasta ferðin, at Leivur var so niðarliga, at hann ynskti at sleppa burtur. Men til alla Guds lukku, eydnaðist honum ikki at fullføra royndirnar.

## Hjálp í eygsjón

Av tilvild hoyrdi Leivur um danska læknan, Øivind Mathiasen, sum niðri verður kallaður, piskesmældslægen.

Leivur setti seg í samband við læknan, og eftir fáar viðgerðir var týðiligur bati hjá honum.

Hann er framvegis í viðgerð hjá læknanum, og brennur nú fyri, at tey her heima, ið líða av hesum sama, skulu fáa sama møguleika, sum hann.

Leivur sigur, at hesi árini hava verið ring at komið í gjøgnum. Skjótt er at gerast beiskur, og nógv kundi verið at funnist at.

- Men tað kann eg ikki brúka til nakað nú. Nú ynski eg at koma víðari við lívi mínum.

Eg eri konu míni so hjartaliga takksamur fyri, at hon hevur hildið út saman við mær alla hesa longu tíð. Áttu vit ikki gudstrúnna í øllum hesum, so veit eg ikki, hvussu hevði verið vorðið hjá okkum, sigur Leivur at enda.



*Alt sá ljóst út hjá Leivi. Saman við konu og soni var hann júst fluttur í nýggj hús á Viðareiði, tá vanlukkan, sum broytti alt, hendi*



Finnur Helmsdal:

# - Høgni Hoydal og Páll á Reynatúgvu onga ávirkan

**- Hvørki stríðið millum meg og Páll á Reynatúgvu ella floksleiðsluna ávirkar avgerðina, um eg aftur fari í tóma tingsessin eftir Annitu á Fríðriksmørk, sigur Finnur Helmsdal, sum enn ikki hevur tikið nakra avgerð. Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, ynskir ikki at viðgera persónsmál í fjølmiðlunum**



*- Sum fólkavaldur havi eg eina ábyrgd yvir fyri veljarum mínum, og eg lati ikki nakað stríð við hvørki Høgna Hoydal ella Páll á Reynatúgvu vera avgerandi, sigur Finnur Helmsdal um avgerðina at taka við løgtingssessinum aftur ella ikki*

TINGSESSUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í mai mánaði í ár var øgiligt stríð innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum. Tingmaðurin Finnur Helmsdal og landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, vóru í hornatøkum í sambandi við uppskot um uppihaldspening, og hæddarpunktið í orrustuni var 6. mai, tá Finnur Helmsdal hevði eitt lesarabræv um floksfelaga sín í landsstýrinum.

## Hvassar skuldsetingar

Finnur Helmsdal segði m.a. soleiðis um Páll á Reynatúgvu 6. mai: "Hevndarhugur landsstýrismansins er eftirhondini vorðin ein sera illa duld loyna millum fólk...hansara ego er so stórt og yvirdimensionerað í allar mátar...nú hevur landsstýrismaðurin dúgliga válkað sær í persónligum útspillingum av mær...hann hugsar bert í maktterminologium...eg eri keddur av, at Tjóðveldisflokkurin, tá hesin fekk møguleikan, valdi ein slíkan landsstýrismann í almannamálum...eg vildi bert ynskt, at hann var okkurt annað enn landsstýrismaður í almannamálum..." Við endan á lesarabrævinum undirskrivaði løgtingsmaðurin seg soleiðis: "Finnur Helmsdal, sum ikki eingang er varamaður longur".

Talan var sostatt um eitt persónligt og hvast álop frá Finni Helmsdal á landsstýrismannin í almannamálum, eftir at skuldsetingar eisini høvdu fokið frá Páll til Finn, og nú Finnur Helmsdal møguliga aftur er á veg í løgtingið, er spurningurin, hvussu hesir menn kunnu sita lið um lið og samstarva í sama flokki, og hvussu ein, "sum ikki eingang er varamaður longur", kann vera tingmaður fyri sama flokk.

## - Stríðið onga ávirkan

Finnur Helmsdal sigur um orrustuna í mai mánaði, at hon ikki fær nakra ávirkan á avgerð hansara.

- Eg eri fólkavaldur og havi tískil eina ábyrgd yvir fyri veljarum mínum. Eg eri valdur at røkja eitt starv, og eg lati ikki nakað stríð verða avgerandi, sigur Finnur Helmsdal. Hann vísir á, at bert faklig og starvslig viðurskifti eru avgerandi í støðu hansara.

Finnur Helmsdal er stjóri á Føroya Barnaheimi, og vísir hann á, at hann noyðist at velja ímillum løgtingssessin og stjórasessin á Barnaheiminum.

- Eg royndi fyrr í ár at røkja bæði størvini, tá Annita á Fríðriksmørk var í farloyvi, men hetta gongur stutt sagt ikki. Eg eri tí noyddur at velja, sigur Finnur Helmsdal. Spurdur, um hann yvirhøvur kann sita lið um lið við Páll á Reynatúgvu eftir tær skuldsetingar, hann bar fram í mai, er Finnur ivasamur.

- Lið um lið...eg veit ikki, um vit vera tað. Soleiðis er spælið nú einaferð, og tað má ein taka við, vísir Finnur á, sum sostatt ikki tykist lata áðurnevnda stríð vera viðkomandi fyri hansara avgerð í dag.

## Svikin av floksleiðsluni

Finnur Helmsdal leggur tó dent á, at ein annar og størri trupulleiki spøkir enn í hugaheimi hansara enn áðurnevndu hornatøk við Páll á Reynatúgvu, og er tað viðferðin, hann fekk frá floksleiðsluni við løgtingsvalið 2002.

- Eg var av flokkinum settur heilt aftast í røðina, og eg gangi út frá, at støða floksleiðslu Tjóðveldisfloksins ikki er óbroytt mótvegis mær. Hetta er meiri týðandi fyri meg enn kjakið við Páll, sigur Finnur Helmsdal. Hann sigur, at hann ikki hevur gloymt hesa raðfesting frá flokkinum, men tvíheldur Finnur tó um, at fakligu og starvsligu viðurskifti hansara sum stjóri á Barnaheiminum bert eru avgerandi.

Finnur Helmsdal slær sostatt fast, at hvørki Høgni Hoydal ella Páll á Reynatúgvu hava nakra ávirkan, hóast viðferð hansara frá floksleiðsluni ikki beinleiðis ger tingsessin meiri attraktivan og minkar eisini um útlit hansara fyri virknari politiskari yrkisleið í Tjóðveldisflokkinum í framtíðini.

Í næstu viku fer Annita á Fríðriksmørk niðan í Mentamálaráðið, og tá skal avgerðin vera tikin, um Finnur Helmsdal fer í tingið ella ikki. Um hann ikki tekur av, er Rói Egholm næstur á listanum.

## Høgni viðger ikki persónsmál

Finnur Helmsdal er sostatt ónøgdur um tann leiklut, hann hevur havt í flokkinum sum aftasti maður í raðfestingini hjá leiðsluni, og luftin gjørdist avgjørt ikki reinari av áðurnevnda stríðið við landsstýrismannin í almannamálum á sinni.

Eisini hava viðurskifti í sambandi við setanina av Annitu á Fríðriksmørk reist nakrar spurningar. Tað er almannakunngjørt, at Annlis Bjarkhamar fekk bjóðað sessin aftur, áðrenn Annita varð sett. Afturat hesum kann aðrastaðni í blaðnum lesast, at Finnbogi Ísakson eisini hevði møguleikan at gerast nýggjur mentamálaráðharri, tí meiriluti var fyri hesum í tingbólki Tjóðveldisfloksins.

Tískil vórðu heili tveir møguleikar royndir, sum høvdu við sær, at Finnur Helmsdal ikki kundi koma aftur í løgtingssessin, áðrenn Annita á Fríðriksmørk varð sett sum mentamálaráðharri, og spurningurin stendur so eftir, um floksleiðslan gjørdi alt fyri ikki at fáa Finn Helmsdal aftur í tingið.

- Eg ynski ikki at viðgera persónsmál í fjølmiðlunum, og tað er langt síðani boðað frá, at Annlis Bjarkhamar hevði møguleikan at venda aftur í Mentamálaráðið, sigur Høgni Hoydal.

Hann hevur heldur ongar viðmerkingar til spurningarnar, um áðurnevndu stríð ikki kunnu fáa negativa ávirkan, um Finnur Helmsdal aftur verður tingmaður, ella um floksleiðslan royndi aðrar møguleikar fyri at umganga, at Finnur Helmsdal kom aftur í løgtingið.



*- Eg ynski ikki at viðgera persónsmál í fjølmiðlunum, sigur tjóðveldisformaðurin, Høgni Hoydal, nú tað stendur Finni Helmsdal frítt í boði aftur at gerast tinglimur fyri Tjóðveldisflokkin*

Páll á Reynatúgvu:

# - Noyðist at góðtaka fólkaræðisligu reglurnar

**- Eg kann ikki gera nógv við, at Finnur Helmsdal møguliga er á veg aftur í løgtingið. Soleiðis eru demokratisku spælireglurnar, sigur ein fáorðaður Páll á Reynatúgvu um møguliga afturkomu Finn Helmsdals, sum hann var í hørðum orðadrátti við fyri bert fýra mánaðum síðani**

TINGSESSUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Páll á Reynatúgvu hevur ikki stórvegis viðmerkingar til, at floksfelagi hansara møguliga aftur verður tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, hóast harða stríðið og persónligu atfinningarnar, sum fuku millum teir báðar í sambandi við mál um uppihaldspening í mai mánaði.

Í greinini omanfyri stendur nakað at lesa av tí, Finnur Helmsdal hevði at siga um Páll á Reynatúgvu, men landsstýrismaðurin í almannamálum hevur møguliga fingið nóg mikið og setir ikki eld í málið aftur við nøkrum kollveltandi útsøgnum.

- Spælireglurnar eru ásettar soleiðis, og tað kann eg ikki seta meg ímóti á nakran hátt, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann hevur heldur ongar viðmerkingar til, um teir báðir yvirhøvur kunnu samstarva í sama flokki eftir so álvarsamar atfinningar og skuldsetingar tíðliga í summar.

*- Eg kann ikki seta meg ímóti demokratisku spælireglunum, eru einastu viðmerkingarnar hjá Páll á Reynatúgvu um møguligu afturkomuna hjá Finni Helmsdal í Løgtingið. Teir báðir vóru veruliga í hornatøkum fyri fýra mánaðum síðani*

